FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



Starvslýsing:

# WEB-HØGGUSLOKKUR

**KT-tænastan á Fróðskaparsetri Føroya leitar eftir fyrstafloks web-høgguslokki**

Við hesum verður lýst eftir fólki til KT-tænastuna hjá Fróðskaparsetri Føroya at byrja skjótast gjørligt. Setrið er í vøkstri, KT-kervið og krøvini til hetta er í støðugum vøkstri og uppgávurnar gerast alsamt fleiri og meiri fjølbroyttar. Tískil hava vit nú brúk fyri einum fjøltáttaðum KT-fólki við denti á kunnleika til nútímans webtøkni.

Starvið fevnir fyrst og fremst um menning og dagligt viðlíkahald av heimasíðuni www.setur.fo. Umsitarin skal røkja síðuna í neyvum samstarvi við úrvald starvsfólk á ymsu deildum Setursins. Fyrimun hava umsøkjarir við góðum førleika í grafikk-framleiðslu og myndaviðgerð og við royndum við CMS-skipanum.

Eisini hevur KT-Tænastan ymiskar menningar-verkætlanir í umbúna og fólkið, ið verður sett í starv, skal eftir førimuni eisini taka lut í hesum arbeiði. Grundleggjandi kunnleiki til arbeiði við nøkrum av fylgjandi: ASP, .NET, PHP, Perl, SQL, XML, XHTML, AJAX verður væntað av umsøkjara.

Harumframt kann roknast við onkrum uppgávum í samband við tann dagliga raksturin av Traðarnetinum.

Hevur tú onkran spurning um starvið, er tú vælkomin at senda teldupost til Óla Simonsen KT-leiðara, á olis@setur.fo. Eisini ber til at ringja til Óla í vanligari arbeiðstíð á 352570.

Umsókn við CV og prógvi um viðkomandi útbúgving og/ella royndir skal sendast til:

Fróðskaparsetur Føroya
ATT: KT-starv
J.C. Svabosgøta 14
FO-100 Tórshavn

Freistin at søkja er mánadagin 13. oktober 2008.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

KT-tænastan er deild hjá Fróðskaparsetrinum beinleiðis undir setursfyrisitingini, sum er dagliga leiðsla stovnsins. Tænastan hevur dagliga raksturin av Traðarnetinum um hendi; Traðarnetið er dátunetið hjá undirvísingar- og granskingarstovnunum á Debesartrøð, og veitir stovnunum ymsar tænastur, so sum Internet-atgongd, firewall, virusverju, teldupost-ambætara, filugoymslu, webhotell, backup, undirvísing, ráðveging o.a. Undirstøðukervið á okkara neti byggir m.a. á Cisco, Novell, VMware, Linux og Windows.

ókeypis.fo
...fá meira fyri einki!
Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!

# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðdeildina G1

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við háteknologi, so er møguleikin her.

Vit søkja eftir avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar í barnsburðarfarloyvi frá 1. november 2008 ella eftir nærri avtalu. Talan er um tvey størv á starvsbrøki 0,8 fram til 1. apríl 2009. Møguleiki er fyri øðrum starvsbrøki eftir avtalu.

Bráðdeildin hevur fleiri ymiskar funktiónir, sum umfata intensiva deild, viðrakning, skaðastovu, bráðmóttøku og læknavaktina.

Tú kemur, í mun til tørv og førleika, at hava ymiskar arbeiðsuppgávur. Ta fyrstu tíðina er talan í høvuðsheitum um tað intensiva økið.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- góða innleiðslu og skipaða upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- starvsfelagar við góðum fakligum førleika
- starvsfelagar, ið ynskja at arbeiða í einum mennandi umhvørvi
- ein spennandi arbeiðsdag við góðum møguleika fyri egnari menning
- at arbeiða triðja hvørt vikuskiftið

**Tú hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við intensivum og bráðfeingis tørvi
- evni til skjótt at skapa tær yvirlit
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hug til fakliga menning og avbjóðingar
- góð samstarvsevni og er fleksibul
- eitt opið og jaligt sinni
- møguleika at arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum
- teldukunnleika
- hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- ábyrgdarkenslu fyri at skapa góðan trivna á deildini

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar inna serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Jórun Højgaard, deildarleiðara á tlf. 304500, lok. 5811, t-post lsjorho@ls.fo ella Hergerð Heldarskarð, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Bráðdeplinum, lok. 5701, t-post lsherhe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 13. oktober 2008 kl. 12.00**

Endurlýsing
## Ergoterapeutur til Psykiatrisku deild

Til okkara vælvirkandi toymi av ágrýtnum og positivum starvsfeløgum á Ergoterapiin á Psykiatrisku deild søkja vit eftir avloysara fyri ergoterapeut 28 tímar um vikuna í tíðarskeiðinum 1. januar til og við 30. september 2009.

Vit bjóða tær eitt arbeiðspláss í stórari menning har tú fært møguleika fyri fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Um arbeiðið:**
Ergoterapiin viðger brúkarar frá øllum psykiatriskum deildum umframt ambulantar brúkarar. Vit arbeiða sentralt í ergoterapiini, og veita tænastu til ymisk toymir á psykiatriska deplinum.

Vit bjóða tær eitt spennandi starv, har arbeiðsuppgávurnar eru sera fjølbroyttar. Vit nýta m.a eina kanadiska fyrimynd sum fatanargrundarlag, og arbeitt verður við skjalprógvan.

**Um ergoterapeutin**
Tú skal vera áhugað/ur í at luttaka í einari spennandi avbjóðing, kunna vísa áræði, vera opin fyri nýggjum tiltøkum og vera við til at útbyggja tað tværfakliga samstarvið við aðrar fakbólkar. Vit leggja dent á persónligar eginleikar so sum fleksibilitet, greiða talu og humor.

Nærri fæst at vita um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a við at venda sær til Súnu Mørk ella Mariannu V. Simonsen, deildarergoterapeut, tlf. 304500, lok. 5785 og 5786, ergopsyk@ls.fo ella Turið Jacobsen leiðandi ergoterapeut, tlf. 304500 lok. 5781, lsturja@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 10. oktober 2008 kl. 12.00**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo